# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Bachelorar í Sjúkrarøkt

**30. januar fingu 14 næmingar á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya prógv sum Bachelorar í Sjúkrarøkt. Útbúgvingin byrjaði í 2004 og tók fýra ár**



***Aftara rað f.v:*** *Gudrun Zachariassen, Klaksvík, Guðrun í Lágabø, Tórshavn, Sára Dam Jacobsen, Tórshavn, Annika K. Sørensen, Froðba, Joan Djurhuus, Hvalvík, Elin S. Højsted, Sandur, og Elsebeth P. E. Jacobsen, Svínoy* ***Fremra rað f.v:*** *Anna Kristina Joensen, Norðragøta, Suffía Høj, Klaksvík, Hanna Helena Skorastein, Syðrugøta, Beinta Káradóttir, Hoyvík, Sissel Eyðfinnsdóttir Jacobsen, Tórshavn, Sólbjørg Sivertsen, Hoyvík, og Kitty Dam, Sandavágur*

*Mynd: Ólavur Frederiksen*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá ið kæra mamma, vermamma, omma og
langomma okkara

**Borghild Signy Eliasen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til tykkum, sum vóru um hana ta síðstu tíðina.
Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Arnfríð, Marita, Mona, Birita og Slavur**

# Tænarar útlærdir á Hafnia

Tveir næmingar á Hotel Hafnia verða útlærdir sum tænarar í hesum mánaðinum. Talan er um Absalon Lydersen Jacobsen, sum bleiv tænari 1. februar 2008, og Charlotte Louise Holmelund, sum verður tænari 12. februar 2008.

Absalon og Charlotte hava staðið í læru 3 ár og 4 mánaðir. Skúlagondin hevur verið í tilsamans 40 vikur á Aalborg Tekniske Skole.

Lærumeistarin hjá teimum, Rósa Maria R. Brodersen, sigur, at tað eru so fá, sum eru í læru sum tænarar í Føroyum, tí er tað við stórari æru at tey bjóða tveimum nýggjum tænarum út í matstovuyrkið. Vit á Hotel Hafnia ynskja Charlotte og Absalon hjartaliga tillukku við útbúgvingini.

Absalon hevur fingið starv á matstovuni Gourmet, og Charlotte heldur fram á Restaurant Hafnia sum sveinur.



*F.v.: Charlotte Louise Holmelund, Rósa Maria R. Brodersen, lærimeistari, og Absalon Lydersen Jacobsen*

### Læknaprógv

31. januar avlegði Rói á Kósini, Klaksvík, læknalyftið við Københavns Universtet og fekk læknaprógv.

### Dagurin

**5. februar. Ata**, deyð umleið ár 250. Henda vakra unga gentan í Cataniu á Sikiloy vildi ikki lovast heidnum fríggjara, av tí at hon var kristin, og varð eftir ræðuligar pínslur tikin av døgum. Grikst navn, Agata, sum merkir tann góða.